# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Eg havi skyldu til at vera opin og at siga sannleikan fyri ikki at geva fólkinum falskar vónir*

*Raul Castro, forseti*

# FARC: Okkara egnu sviku okkum




*Gerado Aguilar og Alexander Farfan vórðu tiknir herfyri. Seinni hjálptu teir herinum at fría gíslar hjá FARC*

*Mynd: AP*

**Uppreistrarrørslan í Kolombia sigur nú, at hon bleiv svikin av sínum egnu, tá Ingrid Betancourt og aðrir gíslar sluppu leysir**

- A tað eydnaðist 15 krígsfangum at flýggja mikudagin 2. juli var ein beinleiðis avleiðing av teirri vanærligu svikagerðini hjá Cesar og Enriqe, sum sviku kollveltingina og misbrúktu tað álit, sum teir høvdu fingið, stendur í einari fráboðan frá FARC, sum bleiv almannakunngjørd um vikuskiftið.

Cesar og Enriqe, sum verða nevndir í fráboðanini, eita í veruleikanum Gerado Aguilar og Alexander Farfan. Teir vórðu tiknir í einum átaki hjá kolombiska stjórnarherinum herfyri, og nú vil FARC vera við, at tað vóru teir, sum hjálptu stjórnarherinum at fría Ingrid Betancourt og 14 aðrar gíslar.

Sambært frágreiðingini fylgdu Gerardo Aguilar og Alexander Farfan gíslunum umborð á eina tyrlu. Teir høvdu greitt fangavørðunum frá, at gíslarnir skuldu flytast til eina aðra legu, men tá fangavørðarnir komu í tyrluna, blivu teir tiknir. Tað vísti seg, at menninir í tyrluni vóru frá kolombisku fregnartænastuni.

Hóast tann dygga smeitin sigur FARC seg framvegis vera til reiðar at tingast við stjórnina um eitt fangabýti. Hildið verður, at FARC hevur umleið 700 gíslar.

# Iranar kunnu roykja seg í hel

**Tað er ikki fallið í góða jørð í Iran, at John McCain mælir til at senda sigarettir til Iran, sum iranar kunnu roykja seg í hel**



Republikanska forsetavalevnið í USA, John McCain, hevur ongantíð verið høgt í metum í Iran, og nú ber av. Hesaferð hevur hann fingið øði í iranska stýrið, tí hann hevur sagt, at tað besta, sum kann fáast burtur úr sigarettum, er at senda tær til Iran, sum iranar kunnu beina sær sjálvum við at roykja seg í hel.

- Tað er skammiligt, at nakar skal siga slíkt, og so mikið verri er tað, at hesin sami maður bjóðar sær til at leiða ta tjóðina, sum sigur seg sjálva vera tað mest siðmentaðu í heiminum, sigur uttanríkisráðið í Teheran.

Tað var í síðstu viku, at John McCain kom við síni viðmerking um sigarettsøluna til Iran. Tey, sum vóru hjástødd, varnaðust, at kona hansara, Cindy, togaði í hann. Eins og iranar mundi hon halda, at hann hevði sagt í meira lagi, skrivar AP.

# Kina brýtur vápnabann

Tíðindafólk hjá bretska kringvarpinum BBC siga seg hava funnið prógv fyri, at Kina hevur selt stýrinum í Sudan vápn og aðra hernaðarútgerð, hóast tað er bannað sambært einari samtykt hjá ST.

Bretsku tíðindafólkini siga, at í sudanska landspartinum Darfur hava tey sæð kinesisk hernaðarakfør, sum komu til Sudan í 2005, og tey siga seg eisini hava rættiliga greiðar ábendingar um, at flogskiparar hjá sudanska flogvápninum hava fingið venjing í Kina.

Tíðindafolk hava fyrr sagt, at tey hava sæð kinesisk stríðsflogfør av slagnum A5 Fantan í Darfur, men tá var svarið úr Beijing, at flogførini vórðu send til Sudan, áðrenn vápnabannið hjá ST kom í gildi.

## STUTT SAGT

### Tony Snow deyður

Tony Snow, sum var talsmaður hjá George W. Bush, forseta og Hvítu Húsunum í Washington í hálvtannað ár, doyði um vikuskiftið. Tony Snow fór frá sum talsmaður í august í fjør av heilsuávum. Hann hevði krabbamein og var 53 ára gamal, þá hann doyði. Tony Snow arbeiddi hjá sjónvarpinum Fox, áðrenn hann bleiv forsetatalsmaður, og sambært BBC fór hann aftur í starv hjá Fox, tá hann gavst í Hvítu Húsunum. Tony Snow arbeiddi eisini saman við Geroeg Bush eldra, tá hesin var forseti. Uppgávan hjá Tony Snow tá var at skriva nógvar av høvuðsrøðunum hjá Bush.



*Tony Snow*

*Mynd: AP*

### Ivi um trygd

Ein tilburður á JFK-flogvøllinum í New York fríggjadagin hevur fingið fleiri at seta spurnartekin við trygdina á flogvøllinum. Flogskiparin á einum Boeing 757-flogfari fór skeivur, tá hann skuldi seta flogfarið, og tað noyddist tí at flúgva í ring, áðrenn tað kundi gera eina roynd afturat. Á ringferðini kom flogfarið í vegin fyri eitt annað flogfar, sum júst var farið á flog, skrivar AP. Amerikonsku loftferðslumyndugleikarnir hava roynt at sissa fólk við at visa á, at tað vóru 800 metrar ímillum tey bæði flogførini, men flúgvileiðararnir á JFK-flogvøllinum siga, at tað vóru bara 200 metrar ímillum tey bæði flogførini.



*Ivi um trygdina á JFK-flogvøllinum*

*Mynd: AP*